## Reglur fyri dátusamskifti

**§1 Allýsingar**
Hesar reglur eru galdandi fyri avtaluna, ið gjørd er millum Elektron og virki/stovnin um dátusamskifti.

**§2 Inndáta**
Eftir móttøku av leveransuni váttar Elektron, at leveransan uppfyllir treytirnar fyri samanseting, við at aftursenda eina positiva samskiftiskvittan. Um treytirnar ikki eru uppfyltar, verður leveransan avvíst, og ein negativ samskiftiskvittan verður aftursend.

Tá Elektron hevur aftursent eina samskiftiskvittan, verður leveransan validerað. Um feilur er í leveransuni, verður ein negativ valideringskvittan ella fráboðan um avvísing aftursend.

**§3 Útdáta**
Tá Elektron sendir eina leveransu til virkið ella stovnin, skal virkið ella stovnurin beint eftir móttøku aftursenda eina samskiftiskvittan.

Tá Elektron hevur lagt leveransuna í samskiftisskipanina, skal virkið ella stovnurin heinta leveransuna. Tá leveransan er løgd í samskiftisskipanina, verður hon mett sum verandi send.

**§4 Greiningar**

| | |
|---|---|
| Dátuviðgeri: | Elektron |
| Dátuveitari: | Virki ella stovnur, ið sambært avtalu skiftir dáta við Elektron – antin sum sendari ella sum móttakari. |
| Dátuumsitari: | Virkið ella stovnur, sum hevur skrivliga avtalu við Elektron um at vera dátuumsitari. Elektron kann eisini verða dátuumsitari. Dátuumsitari skiftir vegna dátuveitaran dáta við Elektron – antin sum sendari ella sum móttakari. Dátuveitarin hevur ábyrgdina av, at nøktandi avtala um samstarv er gjørd við dátuumsitaran. Data hjá veitara kunnu einans sendast/móttakast umvegis veitarans eTrans agent, ið er fingin til vega frá Elektron. |
| Brúkaraeind: | Deild hjá virki ella stovni, ið brúkar skipanir útbodnar av Elektron. |
| Brúkari: | Persónur hjá virki ella stovni, ið hevur fingið loyvi til at skifta dáta við Elektron - antin sum sendari ella móttakari. |
| Leveransa: | Ein ella fleiri rekkjur, ið eru samlaðar í eini eind. |
| Kvittan: | Ein leveransa frá móttakara til sendara, við hvørjari móttakarin viðurkennur at hava móttikið eina leveransu frá sendaranum. |

**§5 Miðlasløg**
Um dáta ikki kunnu sendast til Elektron umvegis eTrans skipanina vegna m.a. ólag á internetsambandinum, kunnu hesi í hendinga førum sendast við telduposti. Hendan loysnin kann bert brúkast eftir serligari avtalu við Elektron.

**§6 Dátuveitarin/-umsitarin**
Um dátuveitarin/-umsitarin sendir leveransur vegna ein ella fleiri kundar, skulu dáta hjá hvørjum einstøkum kunda sær eyðmerkjast í leveransuni. Data hjá veitaranum kunnu einans sendast og/ella móttakast umvegis veitarans eTrans agent, ið er fingin til vega frá Elektron.

**§7 Vegleiðingar**
Dátuveitarin/-umsitarin skal yvirhalda tær vegleiðingar, ið eru galdandi fyri tær einstøku skipanirnar. Samansetingin av leveransunum, ið skulu skiftast við Elektron, er lýst í vegleiðingunum fyri tær einstøku skipanirnar.

**§8 Test**
Í minsta lagi ein av Elektron góðkend test skal verða framd, áðrenn byrjast kann at samskifta framleiðsludáta við Elektron.

**§9 Prísir**
Prísirnir síggjast á tí til eina og hvørja tíð galdandi príslista. Príslistin kann broytast við 1 mánaða varningi. Príslistin fæst við at venda sær til Elektron.

Um Elektron skal veita tænastur, ið ikki eru nevndar í príslistanum, verður serstøk avtala gjørd um prísin. Gjalding fer fram á tann hátt, at Elektron kann skuldskriva ta konto, ið tygum hava valt til hetta endamálið. Samstundis verður ein sundurgreining av skuldskrivaðu upphæddini send tygum.

**§10 Ábyrgd**
Hesar reglur viðvíkja tí teknisku fremjanini av dátusamskiftinum. Einhvør spurningur viðvíkjandi reglunum fyri leveransur, gjøld og endurgjaldsábyrgd v.m. lagast eftir teimum avtalum, ið gjørdar verða við Elektron um lating av viðkomandi skipanum og veitingum. Møgulig krøv kunnu tí bert reisast av virki ella stovni sambært avtaluni fyri tær einstøku skipanirnar, og ikki sambært hesum reglum.

Um so er, at tað í einstøkum føri ikki finst ein avtala um eina ávísa skipan, ella tað í hesari avtalu ikki er tikin støða til ábyrgdina hjá Elektron, er hendan ábyrgdarfyriskipan galdandi:

- Viðvíkjandi feilum og seinkingum í samband við fremjan av dátusamskiftinum, sum Elektron kann gevast ábyrgdina fyri, fevnir endurgjaldsábyrgdin hjá Elektron ikki um óbeinleiðis tap, herundir rakstrartap, mist inntøka og rentutap, óansæð um Elektron kann átalast fyri tapið vegna ósketni ella líknnandi.
- Elektron hevur ikki ábyrgd fyri beinleiðis tapi, orsakað av umstøðum Elektron ikki hevur tamarhald á, herundir tekniskt ólag, ólag á dátusamskifti ella rakstur av neti uttan fyri Elektron.
- Elektron hevur ikki ábyrgd av umstøðum, ið verða mettar sum force majeure, herímillum lógarfyri-skipanir, myndugleikaatgerðum ella tílíkum, breki í streymveiting ella í fjarsamskifti, eldi, royk skaða, spreinging, vatnskaða, herverki, innbroti, náttúruvanlukku, byrjaðum ella hóttandi kríggi, uppreistri, borg-arligum ófriði, valdsgerð ella herverki (sabotasja), verkfalli, verkbanni (lockout), útistongsli (boykot) ella øðrum stongsili.
- Hesar reglur eru galdandi, uttan mun til um Elektron er beinleiðis partur í eini ósemju, ella um ósemjan bert rakar part av virkisøkinum hjá Elektron.

**§11 Broyting av reglunum**
Elektron kann broyta hesar reglur við 1. mánaða varningi. Broytingar verða kunngjørdar á heimasíðuni www.elektron.fo.